# Máttu slaka í einum avgerandi spurningi

**– Tað var avgerandi fyri okkum, at nýggi Smyril var við í sáttmálanum, sum varð gjørdur við Skipara- og navigatørfelagið hósdagin. Og tað eydnaðist, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður**



*Utlitini fyri, at nýggi Smyril kemur í sigling, beinanvegin hann kemur, eru aftur batnað munandi. Men fyri ein part er pínan bara útsett eitt sindur*

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skipini hjá Strandferðsluni verða ikki løgd á hesum sinni.

Tað varð greitt seinnapartin hósdagin, tá ið bæði Skipara- og navigatørfelagið og fíggjarmálaráðið skrivaðu undir nýggjan sáttmála, sum gongur fram til 30. september 2005.

Sìðani týsdagin høvdu partarnir sitið saman við semingsmonnunum á Hotel hafnia og samráðst og seinnapartin hósdagin eydnaðist at finna semju.,

– Tað, sum var rættiliga avgerandi fyri okkum, er, at sáttmálin eisini fevnir um nýggja suðuroyarskipið, sum kemur í heyst, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjamrálum.

Hann sigur, at fíggjarmálaráðið vildi ikki fáa Brimil ella Teistan umaftur, sum báðir lógu í vikur og mánaðir eftir at teir vóru lidnir, tí at semja fekst ikki um sáttmálarnar hjá teimum, sum skuldu sigla við. Og nýggi sáttmálin fevnir eisini um nýggja Suðuroyarskipið og sostatt verða tað ikki skiparin ella stýrimenninir, sum koma at liggja í buktini, tá ið nýggi Smyril er liðugur.

Annars gevur sáttmálin yvirmonnunum á Strandferðsluni og fiskirannsóknarskipinum, Magnus Heinasyni eina lønarhækking upp á 9% hesi bæði næstu árini, tá ið alt er talt við og hetta er tað sama, sum onnur hava fingið.

– Tað eru vit nøgdir við, sigu Bárður Nielsen.

### Máttu slaka

Men afturfyri at fáa nýggja Smyril við, mátti Fíggjarmálaráðið eisini svølgja ein stóran kamel.

Ringasti knúturin at loysa í samráðingunum ímillum Skipara- og navigatørfelagið, var vaktarskipanin umborð á nýggja Smyrli.

Sum er, arbeiða yvirmenninir eftir einari 1:1 skipan, har teir eru eina viku umborð og eina viku í landi.

Hesa skipan vildi Skipara- og navigatørfelagið hava staðfest í sjálvum sáttmálanum.

Tað vildi fíggjarmálaráðið avgjørt ikki.

Ráðið heldur, at hetta er at læsa skipið fast í einum ávísum vaktartímatali og sostatt fer tað hvørki at bera til at lækka ella at hækka túratalið, uttan at tað fer at kosta órímiliga nógv. Tí var tað avgerandi fyri ráðið, at nýggi Smyril ikki var læstur fastur í eini 1:1 skipan.

Men her mátti Fíggjarmálaráðið slaka.

Nýggi sáttmálin staðfestir nevniliga, at arbeitt verður eftir somu skipan sum nú.

Men henda avgerandi broytingar, skulu samráðingar verða um ein nýggja skipan.

Eitt nú skulu samráðingar takast upp um at arbeiðstíðin skal gerast upp yvir eitt longri tíðarskeið. Sum er, verður arbeiðstíðin gjørd upp frá viku til viku, men tað skal bera til at tosa um at longja hetta tíðarskeiði, so at teir kunnu arbeiða meir eina viku afturfyri at arbeia minni eina aðru viku.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum sigur, at hetta staðfestir, at arbeiðast skal framvegis eftir einari 1:1 skipan og tað er hann sera væl nøgdur við. Men skal tað farast burturfrá eini 1:1 skipan, skulu nýggjar samráðingar vera um tað. Hetta viðgongur Bárður Nielsen eisini.

– Men gingu vit ikki við til at binda okkum til eina 1:1 skipan, varð heldur ongin sáttmáli, tí tað var eitt treytaleyst krav frá navigatørunum.

Bárður Nielsen viðgongur, at vandi er fyri, at hetta bara útsetir pínuna eitt sindur.

– Men í øllum førum fingu vit nýggja sáttmálan til eisini at galda fyri nýggja Smyril og tað var tað, sum var heilt avgerandi fyri okkum, sigur hann.

# Afturgongdin í føroyska búskapinum við at steðga

**Nýggjastu metingarnar vísa, at útlitini fyri føroyska bú-skapinum eru bjartari enn tey hava verið leingi, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

BÚSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Nú sær aftur eitt sindur bjartari út hjá føroyska búskapinum.

Hesar seinastu mánaðirnar eru metingarnar vorðnar daprari og daprari og tað er endað við eini beinleiðis afturgongd í búskapinum.

Men nú er gongdin vend.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at tær nýggjastu metingarnar hjá búskaparfrøðingunum í Fíggjarmálaráðnum siga, at nú er afturgongdin í búskapinum við at steðga.

– Metingarnar vísa, at nú sær heldur frægari út aftur. Metingarnar vísa, at enntá, at næsta ár fara inntøkurnar hjá landskassanum enntá at kvinka eitt lítið sindur uppeftir aftur, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at metingarnar vísa, at inntøkurnar hjá landskassanum fara ikki at hækka meiri enn eitt prosent næsta ár.

– Tað er ikki so nógv. Men tað er heilt avgjørt ein gongd, sum er verd at fegnast um, tí tað bendir á at afturgongdin er steðgað og at ein framgongd er at hóma.

### Hallið má minkast

Hetta eru avgjørt góð tíðindi hjá landsstýrismanninum, tú hann er farin undir at fyrireika fíggjarlógina fyri 2005.

Í tí sambandi hevði hann fund við búskaparfrøðingarnar í fíggjarmálaráðnum hósdagin og tað var á hesum fundinum, at teir løgdu tær nýggjastu metingarnar fram.

Hallið á fíggjarlógini í ár er 276 milliónir, sum er.

– Samgongan er samd um, at hallið kann ikki vera líka stórt næsta ár, sigur Bárður Nielsen.

Tað er ikki so langt síðani, at ongin framburður var at hóma í búskapinum. Tað fekk Andreas Petersen, løgtingsmann at vísa á, at so mátti samgongan antin seta sparingar í verk, ella kundi hann ikki vísa tankanum um hægri skattir ella avgjøld, frá sær.

Annars vísa metingarnar at í ár fara inntøkurnar hjá landskassanum beinleiðis at lækka eini tvey prosent í ár, afturímóti í fjør. Talan er um einar 140 milliónir, sigur landsstyrismaðurin.

Tí fegnast hann um, at búskaparfrøðingar nú meta, at inntøkan aftur fer at hækka eitt lítið sindur aftur næsta ár.

### Samgongan heldur gongd í

Bárður Nielsen sigur, at seinna hálvár í 2003 fullu bæði fiskaprísir og prísirnir á alifiski munandi.

Nú vænta búskaparfrøðingarnir, at prísirnir á alifiski fara at hækka eitt sindur.

– Tað verður tó avmarkað, hvørja nyttu vit fáa burturúr aliprísinum, tí nøgdirnar av alifiski, vit hava at útflyta, eru minkaðar heilt munandi.



*– Hetta er avgjørt at fegnast um, tí tað gevur eina ábending um, at afturgongdin í føroyska búskapinum er steðgað, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

Men teir meta samstundis, at prísirnir á fiski fara at kvinka uppeftir aftur. Í øllum førum vænta teir ikki, at hann lækkar enn meir.

Harafturat ætlar samgongan at gera sítt til at halda gongd í búskapinum.

– Landið ger hampiliga stórar útbyggingar í føroyska samfelagnu. Arbeiðið upp á Norðoyatunnilin er byrjað av álvara. Samstundis kemur nýggi Smyril til landið og samstundis fellur seinasti avdrátturin uppá hann, til gjaldingar.

Sostatt eru vit leys av nýggja Smyrli og tað gevur okkum yvir 100 milliónir at brúka til aðrar útbyggingar.

Bárður Nielsen leggur nevniliga dent á, at samgongan ætlar ikki at skerja útbyggingar.

– Vit ætla at brúka pening upp á at byggja út fyri at halda samfelagshjólinum malandi. Og í hesum sambandi er tað ein sera góður máti at brúka pening til útbyggingar, sigur hann.



Fróðskaparsetrið:

# Fimm útbúgvingar aftur í gongd

**Oljuverkrføði, elektroverkfrøði, telduverkfrøði, jarðalisfrøði (geofysikk) og lívfrøði. Hesar fimm útbúgvingarnar standa aftur føroyingum í boði at lesa eftir ein steðg, og í hesum sambandi var hósdagin opið hús á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, har verkætlanir og úrslit hjá næmingum vórðu sýnd fram**

ÚTBÚGVING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Nógv tól, sum universitetslesandi á Náttúruvísindadeildini dagliga arbeiða við, vórðu sýnd fram í Nóatúni hósdagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum Fróðskaparsetrið hevur boðað frá í fjølmiðlunum seinastu dagarnar, verða útbúgvingarmøguleikarnir nú víðkaðir til næsta skúlaár eftir summarfrítíðina. Við tað at tikið verður upp til útbúgvingar annaðhvørt ár, hevur steðgur verið í, men einasta føroyska universitetið bjóðar nú aftur fimm útbúgvingar, sum hava ligið í dvala. Tær eru oljuverkfrøði, elektroverkfrøði, telduverkfrøði, jarðalisfrøði (geofysikk) og lívfrøði. Nakrar av útbúgvingunum eru ikki nýggjar í Føroyum, meðan t.d. oljufrøði er ein nýggj útbúgving í føroyskum høpi. Talan er um bachelor útbúgvingar á 3 1/2 ár, og mótvegis undanfarnu árum hevur Fróðskaparsetur Føroya nýggjar upptøkur til allar útbúgvingar annaðhvørt ár.

Av Setrinum verður upplýst, at eftir bachelorútbúgvingina ber til at halda fram við master lestri (MSc) á útlendskum universitetum. Dømir um lond, har bachelorar hava valt at lesa víðari, eru Bretland, USA, Danmark, Noreg og Svøríki.

Bachelorútbúgvingarnar geva starvsførleikar innan fleiri vinnugreinar, m.a. fiskivinnu, frálandsvinnu, KT-vinnu, fjarskifti ella í fyrsitingarstørvum, sum krevja holla vitan innan náttúruvísindi, umhvørvi, tøkni og verkfrøði.

### Næmingar sýndu fram

Í sambandi við hesar broytingar var hósdagin opið hús í Nóatúni á Náttúruvísindadeildini á Setrinum, og vórðu verkætlanir og úrslit hjá næmingum sýnd fram fyri gestum við plakatum, teksti og myndum. Eisini vóru nógv arbeiðstól og mikroskop at síggja, sum universitetslesandi á Setrinum arbeiða við, og Hans Pauli Joensen á Náttúrvísindadeildini greiðir frá, at arbeiðið hjá næmingunum er í tøttum samstarvi við vinnuna.

– Fleiri av útbúgvingunum eru ógvuliga áhugevardar fyri vinnuna, og vit hava upplivað, at nøkur verkætlanarúrslit hjá næmingum hava verið nýtt í vinnuni, greiðir Hans Pauli Joensen av Náttúruvísindadeildini frá. Dømi um úrslit og íkast, næmingar av Setrinum hava verið fyri vinnuna, er radiostýrd fóðurskipan í alivinnuni, tól at máta iltinnihald í smolti o.a. Áhugin í vinnulívinum tykist tó vera størstur fyri nýggju KT-útbúgvingini, sum fór í gongd á sumri í 2002, og í næstum kunnu 14 føroyskir næmingar kalla seg bachelorar í kunningartøkni. Hans Pauli Joensen upplýsir, at KT-útbúgvingin aftur verður bjóðað út í 2005.

### Fyrilestrar

Í samband við tiltakið hósdagin vórðu tríggjar almennar framløgur frá fólki í vinnuni, sum greiddu frá tørvi og møguleikum hjá næmingum á arbeiðsmarknaðinum eftir lokna útbúgving. Guðrið Andorsdóttir viðgjørdi tørvin á útbúnum fólki í fiskivinnuni, Jóhannes Steingrund tosaði um verkfrøði í privatu vinnuni, og Sigurð í Jákupsstovu upplýsti um tørvin á útbúnum fólki í oljuvinnuni.

Fróðskaparsetrið fer at lýsa eftir næmingum til nýggju útbúgvingarnar um mánaðarskifti apríl-mai, og vónað verður sjálvsagt, at eftirspurningurin verður stórur. Umframt áðurnevndu KT-útbúgving tykist lívfrøði sambært Hans Paula Joensen hava stóran áhuga.

### Skerdar játtanir

Tað kann tykjast løgið fyri fleiri, at Fróðskaparsetrið yvirhøvur er ført fyri hesum, nú flestu játtanir á ársins fíggjarlógaruppskotið eru skerdar – eisini til universitet okkara.

– Tað er avgjørt ikki orsakað av størri fíggjarligum rásarúmi, at vit aftur kunnu fara í holt við áðurnevndu útbúgvingar. Í stórum pørtum av ymsu útbúgvingunum verður undirvísingin felags og næmingarnir saman, og á henda hátt spara vit nógv, sigur Hans Pauli Joensen. Eins og næmingar á søgu- og samfelagsdeildin eru í sama báti fyrsta partin av útbúgvingini, fáa næmingarnir í hesum fimm útbúgvingunum somu undirvísing fyrstu tíðina, so útreiðsluvøksturin ikki er kostnaðurin á fimm útbúgvingum fleiri.




*Verkætlanir og úrslit hjá næmingum á Setrinum vórðu at síggja á Náttúruvísindadeildini hósdagin, og fleiri av hesum uppgávum verða gjørd í tøttum samstarvi við føroysku vinnuna*

*Mynd: Álvur haraldsen*